# Ætlanaryvirlýsing
# millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri
# um eitt nýtt fongsul í Føroyum

Kriminalforsorgin í Føroyum røkir eina týdningarmikla samfelagsuppgávu og ger sítt til at styrkja tryggleikan í føroyska samfelagnum. Danska stjórnin og Føroya landsstýri vilja betra um karmarnar fyri tey, ið skulu sita dóm í Føroyum, soleiðis at bæði innsett og starvsfólk fáa tíðarhóskandi umstøður.

Danska stjórnin og landsstýrið eru tí á einum máli um at seta ferð á tilgongdina at byggja eitt nýtt og størri fongsul í Føroyum, sum skal avloysa varðhaldið í Mjørkadali. Tilgongdin er í trimum stigum, og tíðarætlanin er henda:

- Í 2023 og 2024 verður byggiverkætlanin prosjekterað. Her skulu stjórnin og landsstýrið koma ásamt um staðsetingina.
- Í 2025 og 2026 verður grundøkið útvegað og gjørt byggibúgvið.
- Í 2027-2030 verður nýggja fongslið bygt.

Danska stjórnin setur longu nú pening av til prosjekteringina. Stjórnin fer at seta neyðuga peningin av, tá ið meira vitan er fingin til vega um, hvat verkætlanin krevur og kostar. Fíggingin er treytað av, at Fólkatingið tekur undir við verkætlanini, og tekur undir við at seta neyðuga peningin av á donsku fíggjarlógini.

Við nýggjum og tíðarhóskandi fongsulskørmum í Føroyum, er neyðugt, at fleiri viðurskifti hjá teimum, sum skulu sita langan dóm í Føroyum, verða avgreidd millum danskar og føroyskar myndugleikar, millum annað undirvísingar- og arbeiðsmøguleikar hjá teimum, sum sita dóm. Danska stjórnin og Føroya landsstýri eru samd um, at áðrenn nýggja og tíðarhóskandi fongslið verður tikið í nýtslu, verða eitt nú bæði føroyskir útbúgvingarstovnar og føroyska vinnulívið tikin við upp á ráð.

Undir allari verkætlanartilgongdini fara viðkomandi danskir og føroyskir myndugleikar at hava tætt samstarv.

Tórshavn, tann 7. juni 2022

| | |
|---|---|
| Mette Frederiksen<br>Forsætisráðharri | Bárður á Steig Nielsen<br>Løgmaður |